# SAMSTARVSTREYTIR HJÁ ADVOKATPARTAFELAGNUM FAROE LAW

Um onnur avtala ikki er gjørd, eru hesar samstarvstreytir galdandi fyri løgfrøðiligu uppgávurnar, sum vit átaka okkum:

**1**

*Hvat uppgávan fevnir um, og hvussu hon verður avgreidd*

**1.1**

Faroe Law og kundin avtala, hvat uppgávan fevnir um og tíðarætlanina fyri løgfrøðiligu ráðgevingina, sum Faroe Law skal veita kundanum.

**1.2**

Faroe Law bindur seg mótvegis kundanum at veita kvalifiseraða ráðgeving sambært avtalaðu treytunum í avtalaða tíðarskeiðnum.

**2**

*Samanfellandi áhugamál*

**2.1**

Sum føroyskt sakføraravirki er Faroe Law fevnt av reglunum í rættargangslóginin um m.a. góðan sakførarararasið og av sakføraraetisku reglunum, sum Advokatrådet hevur tilevnað. Hesar ásetingar seta krøv til fakligt støði og fagligan etik. Allar uppgávur, sum Faroe Law átekur sær, verða avgreiddar í samsvari við reglurnar í rættargangslógini um sakføraravirksemi, sakføraraetisku reglurnar hjá Advokatrådet og aðra viðkomandi lóggávu.

**2.2**

Í samsvari við reglurnar hjá Advokatrådet og innanhýsis reglur og mannagongdir tryggja vit, at eingi samanfellandi áhugamál eru, áðrenn vit átaka okkum eina uppgávu fyri ein kunda. Um

samanfallandi áhugamál ella ógegni standast undir viðgerðini av málinum, sum hava við sær, at vit mugu siga málið frá okkum, vísa vit fegin á annan sakførara, sum kann yvirtaka málið, eins og vit veita nýggja sakføraranum og kundanum stuðul í tann mun, tað er viðkomandi.

**3**

*Samleikaupplýsingar og reglur í sambandi við hvítvask.*

**3.1**

Sum føroyskt sakføraravirki er Faroe Law fevnt av reglunum í hvidvaskloven um fyribyrgjandi átøk móti hvítvaski av peningi. Vit útvega og varðveita tí samleikaupplýsingar um kundar okkara í tann mun, hetta er kravt sambært lóg.

**4**

*Nýtsla av ráðgeving okkara.*

**4.1**

Okkara løgfrøðiliga ráðgeving er ætlað einstøku ítøkiligu uppgávuni og er einans veitt kundanum til nýtslu í sambandi við ta ítøkiligu uppgávuna.

**4.2**

Kundin fær neyðugu rættindini til at nýta skrivliga tilfarið, sum Faroe Law útvegar kundanum sum lið í løgfrøðiligu ráðgevingini, men Faroe Law varðveitir øll upphavsrættindi og onnnur immateriel rættindi til tilfarið.

**5**

*Samsýning og gjald*

**5.1**

Ásetingin av samsýning er tengd at fleiri táttum. Tá samsýningin verður ásett leggur Faroe Law dent á nýttu tíðina, servitan og royndir hjá luttakandi løgfrøðingunum, hvussu fjøltáttað uppgávan er

og hvønn týdning hon hevur fyri kundan, fyriliggjandi virðini, endaliga úrslitið og ta ábyrgdina, sum er tengd at uppgávuni.

**5.2**

Útreiðslur, herundir eykagjøld, ferðaútreiðslur, vistarhald, sendingarkostnaður, uttanhýsis transmissiónsútreiðslur eins og útreiðslur til telefonfundir verða goldnar av kundanum umframt samsýningina.

**5.3**

Ùtreiðslur til fjølritan av tilfari í sambandi við uppgávuna verða avroknaðar í mun til ítøkiliga meting og verða goldnar av kundanum umframt samsýningina.

**5.4**

Tað kann vera trupult at meta um arbeiðið, sum er tengt at uppgávuni og harvið áseta samsýningina longu tá uppgávan verður móttikin. Um ikki ber til at upplýsa samsýningina áðrenn uppgávan er átikin, upplýsa vit eftir nærri avtalu um, hvussu vit áseta samsýningina, t.d. nýttu tímaprísirnir, eins og vit eftir nærri avtalu veita kundanum eina grundaða meting og kunning um væntaða kostnaðin. Vit kunna skjótast gjørligt kundan, um tað vísir seg, at samanlagda samsýningin væntast at verða størri, enn mett varð.

**5.5**

Vit avrokna veittu ráðgevingina, útreiðslur og útlegg og senda rokning við endan á hvørjum mánaða, við endan á hvørjum ársfjórðingi ella øðrum hóskandi tíðarskeiði.

**5.6**

Uttanhýsis útreiðslur og útlegg kunnu krevjast goldnar undanfarandi. Nýggir og útlendskir kundar verða bidnir um undanfarandi samsýning. Undanfarandi útlegg ella utreiðslur eins og samsýning verða sett á kundakonto og kunnu íroknað rentur nýtast til at gjalda komandi rokningar og útreiðslur, um onnur avtala ikki er gjørd.

**5.7**

Okkara gjaldstreytir eru netto kontant frá dagfesting á rokningini. Verður goldið eftir skuldin er

fallin til gjaldingar verður mánaðarrenta á 1 % løgd afturat.

**5.8**

Øll peningaogn kundans, sum verður latin Faroe Law í varðveitslu, verður umsitin sambært regulunum hjá Advokatrådet og verður sett á tilhoyrandi kundakonto. Møguligar tilgóðarskrivaðar rentur verða goldnar kundanum sambært reglunum hjá Advokatrådet.

**6**

*Trúnaður og innanhýsis reglur*

**6.1**

Øll starvsfólk í Faroe Law eru undirløgd tagnaðarskyldu. Faroe Law hevur skyldu at handfara allar upplýsingar, sum eru móttiknar frá ella viðvíkjandi einum kunda í sambandi við eina uppgávu í trúnaði, um tað ikki er greitt av umstøðunum, at upplýsingarnar ikki skulu handfarast í trúnaði.

**6.2**

Øll starvsfólk í Faroe Law eru fevnd av serligum reglum sambært galdandi lóggávu um forboð móti at lata víðari innanhýsis vitan um partabrævamarknaðarskrásettar fyritøkur og avmarkingar fyri handli við skrásettum partabrøvum.

**7**

*Ábyrgd, ábyrgdaravmarking og trygging*

**7.1**

Faroe Law hevur ábyrgd av veittu løgfrøðiligu ráðgevingini sambært vanligu reglunum í føroyskari lóggávu.

**7.2**

Fyri Faroe Law, eigararnar og starvsfólk er ábyrgdin tó avmarkað til DKK 10.000.000,00 fyri hvørja uppgávu. Faroe Law, eigararnir og starvsfólkini kunnu ikki ábyrgjast fyri óbeinleiðis tapi,

fylgiskaðum ella ikki-fíggjarligum fylgjutapi, íroknað rakstrartapum, missi av dátu, vinningstapi, goodwill, hugmynd og øðrum sløgum av óbeinleiðis tapum.

**7.3**

Faroe Law hevur teknað ábyrgdartrygging við sakføraratrygd hjá tryggingarfelagnum Codan Forsikring. Um tørvur er á serligari verkætlanarábyrgdartrygging í sambandi við eina óvanliga ella óvanliga stóra uppgávu samráðast vit gjarna um møguleikarnar og treytirnar í hesum sambandi undan vit átaka okkum uppgávuna.

**7.4**

Faroe Law kann ikki ábyrgjast fyri møguligar villur gjørdar av ráðgevum, sum Faroe Law hevur víst kundanum til. Faroe Law kann heldur ikki ábyrgjast fyri møguligar villur gjørdar av undirveitarum, sum Faroe Law eftir avtalu við kundan hevur latið partar av uppgávuni at loysa.

**7.5**

Okkara ráðgeving er avmarkað til viðurskifti viðvíkjandi føroyskum rætti og okkara ráðgeving verður tí einans givin í mun til føroyskan rætt.

**7.6**

Faroe Law kann ikki ábyrgjast fyri møguligar villur gjørdar av samstarvsskrivstovum okkara í Grønlandi, Danmørk, Russlandi, Ukreina ella Pólandi í tann mun villan er gjørd í sambandi við sjálvstøðugt skrivaða rokning fyri arbeiði hjá viðkomandi samstarvsskrivstovu. Hetta er galdandi, hóast Faroe Law hevur luttikið í somu verkætlan, og hóast Faroe Law hevur móttikið fjølrit av villufongda tilfarinum.

**8**

*Klagur*

**8.1**

Sum føroyskt sakføraravirki er Faroe Law fevnt av vanligu reglunum hjá Advokatrådet um klagur í sambandi við samsýning og atburð.

**8.2**

Um kundin ikki er nøgdur við ráðgeving okkara ella ásettu samsýning okkara, biðja vit kundan seta seg í samband við stjóra felagsins. Um kundin og stjórin ikki kunnu semjast, verður ósemjan latin innanhýsis etikknevnd okkara. Etikknevndin syrgir fyri, at klagan við siðiligari loysn í huga verður viðgjørd sambært innanhýsis mannagongdum, sum m.a. tryggja meting frá einum ella fleiri royndum advokatum, sum ikki hava luttikið í loysnini av uppgávuni.

**9**

*Lógarval og varnarting*

**9.1**

Ráðgevingin hjá Faroe Law og hesar samstarvstreytirnar eru undirgivnar føroyskum rætti.

**9.2**.

Møgulig trætumál kunnu einans skjótast inn fyri føroyskar dómstólar.